Lesið internet Sosialin !




Sosialurin
www.sosialurin.fo


# KOKKUR

Vit sóknast eftir dugnaligum kokki!



Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tel 309090 att.: Kári Hentze

TEAM85

RIO BRAVO RESTAURANT
Tel 319767 · riobravo.fo

HOTEL VÁGAR
Tel 309090 · hotelvagar.fo

AIR CAFÉ
Tel 340090 · hotelvagar.fo


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo


TOYOTA

## Plátusmiðjur uttan skøvur í lakkinum

Til plátuverkstaðin sóknast vit eftir ein væl royndum plátusmiðji at byrja skjótast møguligt.

Plátuverkstaðurin umvælir nærum allar plátu og karossarískaðar fyri viðskiftafólk okkara.
Til plátuverkstaðin hoyrir eisini lakkverkstaður, har vit umvæla smærri lakkskaðar eins væl og vit heillakkera bilar.

Sum plátusmiðjur fært tú góðar arbeiðsumstøður til tær nógvu og krevjandi uppgávurnar.
Vit leggja stóran dent á gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Hinvegin krevja vit, at plátusmiðjurin kann arbeiða sjálvstøðugt og tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til arbeiði við upprættarabonki av slagnum Caroliner.

Hóast talan er um arbeiðið, har tú hugsar og arbeiðir sjálvstøðugt, er plátusmiðjurin partur av einum toymi, har aðalmálið er valaverk til ein nøgdan skara av viðskiftafólki.

Løn sambært avtalu.

Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Páll av Teigum ella Eivind av Reyni.

Reyni Service
Plátusmiðjur
Vegurin langi
188 Hoyvík

TEAM85



Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

## TIL SØLU

Hugnalig sethús við stórum og vøkrum urtagarði við Sundsveg 9 , í Tórshavn (matr. nr. 1457a).



**Húsini:**
Húsini eru bygd fyrst í fimti´árunum. Tey eru snøgg og væl røkt.

**Uttan:**
svartur timburklædningur, hvít sprossavindeygu og grøn aluminiumstekja. Í húsunum eru 5 sovirúm og baðirúm í erva, í neðra gangur, køkur, 2 stovur umframt útistova við útgongd til hátún. Í somu hædd er úthus við 2 rúmum, har annað er vaskirúm. Húsini eru í 2 hæddum umframt kjallara. Í neðra umleið 70 m² og í erva umleið 70 m² við høgum trimpli umframt úthús 25 m² til víddar. Grundøkið er 2984 m².
Pláss er fyri fleiri bilum.

**Urtagarðurin:**
Uttanfyri er stórur urtagarður við gøtum, hugnaligum sólkrókum, nógvir runnar og trø og grasvøllur. Løkur rennur ígjøgnum økið vestanfyri.

**Økið:**
Húsini liggja í hugnaligum og friðarligum umhvørvi, við góðum sólargangi og góðum útsýni - millum Sortudýkið og Berjabrekku. Tað er frítt rundan um ognina. Her er stutt til barnagarðar, skúlar, ítróttarøki, matvøruhandlar, lækna og bakara. Busssambandið er gott. Teinurin oman í býin tekur um 15 min. at ganga.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við Hans Trygva Teirin, tlf. 225045 - Advokatvirkið, Skansavegur 1, 100 Tórshavn.



# Starvsfólk til KT-deildina

Søkt verður eftir starvsfólki til KT-deildina hjá Atlantic Airways.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- Menning av skipanum og mannagongdum
- Viðlíkahald av netinum, skráum og kervinum o.a.
- Upplæring, vegleiðing og skipan av skeiðum fyri brúkarum
- Fyrireika innkeyp av telduútbúnaði og aðrari skristovuútgerð

**Krøv**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:
- hevur hollan praktiskan kunnleika umframt útbúgving innan økið
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Vit bjóða eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Nýggja kt-starvsfólkið skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. august 2006. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Reidar Ole-Jacobsen, KT-leiðara, á tlf. 34 10 00 ella e-mail: reidar@atlantic.fo.

Umsóknin skal sendast til:
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, Vága floghavn, 380 Sørvágur

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasambandi til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum
www.flyfaroe.com